## DAGSINS MEINING

# Ein miðvísan íbúðapolitikk

Á hesum stað er fleiri ferðir víst á, at vit hava ikki nakran miðvísan íbúðapolitikk í Føroyum. Hetta er ídag eitt grátt øki, har tilvild og spekulatión ræður. Tá málið hevur verið reist her, hava vit fyrst og fremst hugsað um, at vit hava ikki nakra miðvísa íbúðabygging til tey, sum ikki eru før, ella sum ikki hava møguleika at byggja sær síni egnu hús.

Men nú er líkt til, at nakrir politikkar, m.a. landsstýrismaðurin, eru farnir at vísa málinum ans. Eisini aðrir politikkarar hava verið frammi. Býráðsformaðurin í Havn t.d. komin við uppskoti um at lata teimum, sum leiga íbúðir út, skattalætta. Hugsanin er, at tað eru fólk, sum kanska hava eina kjallaraíbúð, men vilja ikki leiga hana út, tí tey skulu gjalda skatt av leiguinntøkuni. Skattalætti skal eggja fólki til at leiga út. Øvugt heldur hann ikki, at tey, sum leiga, skulu fáa ein skattafrádrátt!

Tað stóra trotið á íbúðum verður ikki loyst við einum slíkum uppskoti. Sum er, kunnu allir húsaeigarar draga rentuútreiðslur frá, og fáa hana aftur sum rentustuðul. Tað merkir, at ger ein húsaeigari eina kjallaraíbúð, fer kostnaðurin upp í húsalánið, sum kann dragast frá. Skuldu vit fylt uppskotinum hjá býráðsliminum, skal hesin sethúsaeigarin eisini hava ein skattalætta. Tað kann ikki verða rætt. Sum er, hevur hann rætt til at draga útreiðslur fyri trygging, viðlíkahald og rentur frá!

Vit mugu hinvegin hugsa um at skapa eina betri lóggávu fyri íbúðabygging til bæði eigara- og leiguíbúðir. Serliga átroðkandi er spurningurin um leiguíbúðir, tí tey, sum t.d. leiga í einum nýggjum íbúðahúsum, kunnu ikki draga nakað frá. Tí má leigan vera hóskilig, og ein hóskilig lág leigu fæst ikki, um byggingin ikki annaðhvørt er stuðlað við eginpeningi frá landi ella kommunum. Tey, sum byggja síni egnu sethús, kunnu draga rentuna frá, og tí hevði verið rættast, at íbúðabygging til leigu annaðhvørt fær eginpening í stuðli ella sleppur undan meirvirðisgjaldi.

Hetta er bara ein partur í spurninginum, tí størsti trupulleikin í høvuðsstaðnum er í dag, at stóri eftirspurningurin hevur trýst sethúsaprísir og leigugjøld so høgt upp, at vanligir løntakarar hava ongan møguleika at keypa ella leiga eini hús ella íbúð. Hetta hendir samstundis sum vit ikki hava eina veruliga og tíðarhóskandi leigulóg, sum tryggjar leigaran. Tí má hetta seinasta eisini takast við í orðaskiftið.

At hava ein góðan bústað er ein grundleggjandi spurningur í lívi okkara. Eitt gott býli er somuleiðis treytin fyri góðum og tryggum uppvakstrarumstøðum. Hetta mugu politikkarar okkara gera sær greitt, nú teir eru farnir at geva hesum máli størri ans, og kanska fara at orða ein bústaðarpolitikk, sum má miðja ímóti, at øll hava ein góðan bústað, líka mikið hvussu inntøkan ella førleikin er!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bert til upplýsing

**Høgni Hoydal**



Okkum restar enn stór tøk til tess at skapa eitt trygt, føroyskt vælferðarsamfelag. Men søgurnar um skerjingar á vælferðar- og útbúgvingarøkinum eru heilt skeivar. Hinvegin eru stórar betringar hendar.

Síggi, at javnaðarflokkurin sigur, at vit enn ikki eru komin upp á 1990-støðið í føroyska samfelagnum. Her hugsa teir ivaleyst um almennu útreiðslurnar og íløgurnar. Tað støðið vóni eg ikki, at vit nakrantíð koma aftur á.

Tí tá brúktu vit eitt nú allan blokkstuðulin og tóku stór lán uttanlands. Tá brúktu vit framvegis meira enn 400 milliónir í stuðningi til vinnuna – og høvdu annars dundrandi undirskot allastaðni.

Tað vil siga, at hvørki okkara almannaverk, heilsuverk ella skúlaverk vórðu raðfest eins høgt á fíggjarlógini og nú.

Kortini hoyrist hetta mangan millum fólk: »Teir niðurpína samfelagið fyri at spara upp til fullveldið«. Yvirskriftirnar í fjølmiðlunum benda á tað sama.

### Ongin niðurskurður, men stórar betringar

Men hvør er nú veruleikin?
• Síðani 1998 er nýggjur studningur til fiskivinnuna strikaður – hóast fleiri uppskot hava verið á borðinum.
• Almannaøkið er hækkað munandi við uml. 200 mió. kronum frá 1998 til í dag (herundir serliga heimarøkt, serforsorg og fólkapensión.)
• Heilsuøkið er hækkað við uml. 100 mió. kr. – og nýtt landssjúkrahús er í gerð.
• Undirvísing, mentan og gransking er hækkað við 130 mió (herundir er játtanin til fólkaskúlan hækkað við 34 mió. kr).

Sostatt kann sigast, at tað, sum varð brúkt uppá studning í 1990, verður í dag brúkt til at betra okkara felags skipanir.

### Vit skulu eisini betra – ikki bert hækka

Kortini er alt verri enn so loyst við hesum. Fleiri pengar eru ikki bara loysnin, men broytingar og betringar skulu gerast í øllum vælferðarskipanum, so tær koma at virka betri og effektivari. Og fleiri ár fara at ganga, áðrenn vit kunnu siga, at vit hava rímiliga nøktandi skipanir í almanna-, heilsu- og undirvísingarverki okkara.

Men raðfestingarnar eru greiðar. Onki er skorið niður á vælferðarøkinum.

Og fara vit ikki aftur at brúka danskar pengar til at gykla okkum eina vælferð fyri, so kunnu betringarnar halda fram. Á tryggum støði. Í teimum frælsu Føroyum.

# S & K nýggjan sáttmála

**Tíðindaskriv**

Um hálvgum tólv tíðina mikukvøldið undirskrivaðu S&K-felagið og Føroya Arbeiðarafelag undir semju til nýggjan 2 ára sáttmála við Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Semjan gevur limunum í S&K-felagnum eina samlaða lønarhækking uppá góð 11,5%.

Sjálv lønarhækkingin er 9,88%: 5,06% koma aftur lønunum frá 1. mai í ár og 1. mai næsta ár hækka lønirnar við 4,82%.

Eftirlønin hækkar við 1,6%: 0,8% frá 1. mai í ár og aftur við 0,8% 1. mai næsta ár.

Harafturat hækkaðu allar viðbøturnar við kr. 1,-.

Semjan gevur limunum í S&K-felagnum eina lønarhækkan innanfyri karmin av lønarhækkingini sum Føroya Arbeiðsgevarafelag fekk.

Hóast feløgini høvdu ynski um eina væl hægri lønarhækking, so mugu feløgini tó ásanna, at neyvan komst longur, sjálvt við møguligum tiltøkum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði avgjørt lønarkarmin og vísti ongan áhuga í at fara út um henda.

Semjan inniber eisini nakrar smávegis broytingar í sáttmálanum annars, m.a.

– miðja verður eftir at limirnir gerast fastløntir

– og ein týðandi umsitingarlig broyting er, at framvyrir skulu arbeiðsgevarar flyta limagjaldi beinleiðis til ávikavist Føroya Arbeiðarafelag og S&K-felagið.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Demokrati er gott, men helst í tjóðri og við múlabandi - tað halda tjóðveldis- og fólkaflokkur

**Hans Pauli Strøm, javnaðartingmaður**



Sjálvur hornasteinurin í einum demokratii er framsøgufrælsi, frælsi hjá hvørjum einstøkum borgara at føra fram síni sjónarmið. Onki hevur størri týdning enn hetta. Men skal hetta frælsi hava veruligt innihald og ikki verða eitt tómt hylki, er altavgerandi,

• at allir borgarar hava óskerdan rætt til hetta frælsi – tvs at ongin myndugleiki ella valdsharri skal royna at avmarka hendan rættin, t.d. um teir halda at tað, tú førir fram, er eitt politiskt álop á teir.

• at allir borgarar hava veruligan møguleika at brúka hetta frælsi – tvs møguleika at føra sítt sjónarmið fram á ein hátt, so tey verða hoyrd, t.d. í fjølmiðlunum.

• at allir borgarar aktivt brúka teirra framsøgufrælsi, í gerandisdegnum, á arbeiðsplássinum, í frítíðar- og mentunarvirkinum, á politiska vøllinum – tvs. at myndugleikarnir skulu ikki við hóttanum ella beinleiðis í forðingum royna at múlabinda nakran borgara, so hann ikki sleppur ella ikki torur at brúka hetta frælsi.

Tað er tí at fremja demokrati í verki, ikki bara at eiga rættin at frambera síni sjónarmið, ikki bara at hava møguleikan, men eisini veruliga at brúka møguleikan.

Mangan táið eg hoyri og síggi sjónarmiðini hjá fólkafloks- og tjóðveldisfólkinum, gerist eg óttafullur um hvussu tað verður at liva í Føroyum, um teir sleppa at ráða so sum teir vilja. Tórbjørn er farin – fyribils – men aðrir traðka fúsir í hansara fótasporum. Ein er Jógvan við Keldu. Hann skrivar í Dimmalætting t. 14. í hesum um "Vestmanna skúla, løgregluna og Javnaðarflokkin".

"Bakbit frá einum skúla eru vandamikil" skrivar Jógvan við K. Og heldur hesin fólkafloksdemokraturin fram: "Tá umboðið fyri Vestmanna skúla í samrøðuni við Útvarp Føroya gjørdi upp við Mentamálastýrið í samband við tímatalið, kendist hetta beinanvegin sum eitt politiskt álop, hóast eg ikki vísti hvør hetta umboðið var, og hvønn hon hoyrdi til". Hoyri demokratin tala ! Onki veit Jógvan um hennara politisku hugsanir – men fyri hann er nóg mikið at vita, hvørjum hon er gift við ! Guð forbarmi seg !

Um skúlaleiðsluna í Vestmanna sigur Jógvan v. K., at við at fara út í fjølmiðlarnar hevur hon "stungið sínar leiðarar í ryggin", og hon "bakbítur arbeiðsgevara sín í fjølmiðlunum". Tað sigst at Jógvan v. K. hevur gjørt nakrar royndir í privatum vinnulívi. So hann heldur seg óivað vera á heimavølli tá hann sigur: "Á einum privatum arbeiðsplássi og umborð á skipi verður hetta kalla "myttarí", og tað eigur at fáa avleiðingar."

Vit vita hvat tað merkir, at "tað eigur at fáa avleiðingar". So fólkafloksdemokraturin Jógvan v. K. heldur, at tá skúlaleiðslan í Vestmanna brúkar síni demokratisku rættindi á ein hátt, honum ikki dámar, so eigur hon at fáa sekkin.

Demokrati er gott, men altso ikki tá tað snýr seg um ávísar persónar og stovnar, halda tjóðveldis- og fólkaflokspolitikkarar. T.d. tá tað snýr seg um Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismann. Ella tíðindablaðið Sosialin, ið prentar hansara egnu orð og sjónarmið. Ella Jóannes Eidesgaard, javnaðarformann. Ella búskaparfrøðing, um hann vágar sær at seta annað roknistykki upp enn búskaparfrøðingurin hjá landsstýrinum. Ella rektaran á læraraskúlanum. Ella álitisfólk í fólkaskúlanum, sum er gift við javnaðarløgtingsmanni. Ella skúlaleiðsluna í Vestmanna, um hon fortelur foreldrum og almenningi, at skúlin fær ikki røkt sínar skyldur við tillutaða tímatalinum...Vit kundu hildi áfram, tí dømini eru fleiri.

Langt er millum sjónarmiðini hjá fólkafloks- og tjóðveldispolitikkarum og ta amerikansku grundlógina, sum áleggur hvørjum einstakum borgara at verja síni rættindi og berjast ímóti einihvørjari skerjing av demokratiska frælsinum og virka fyri teimum – eisini tá tað eru landsins myndugleikar og valdsharrar, sum hava hug at múlabinda tey, ið vága sær at stinga nasarnar fram.






# Gallarí "Ribarhús", í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV
*Gallarí Ribarhús*

Í morgin, sunnudagin, 17. juni, kl. 15, letur gallarí upp í Fuglafirði. Gallaríið er innrættað í "Ribarhúsi", goymsluhølunum hjá gamla handlinum Niðri í Støð í Fuglafirði, har Fuglafjarðar Heimavirkisfelag og Fuglafjarðar Fornminnisfelag halda til. Sjálvur handilsbygningurin bleiv bygdur og læt upp í 1887, meðan "Ribarhús" bleiv bygt afturat handilsbygninginum í 1910 til at taka í móti teim stóru nøgdunum av vøru, sum økta virksemið í bygdini tørvaði um hetta mundið. Navnið "Ribarhús", sum fólk skjótt fóru at rópa hetta hús, er eftir S/s "Riberhuus" hjá DFDS, sum var millum tey skip, ið fyrst vóru til handilin um tað mundið, hetta pakkhús bleiv tikið í nýtslu. Ætlanin við hesum gallarí er at geva pláss til framsýningar og minni tónleikatiltøk. Fyrsta framsýningin letur - sum oman fyri nevnt - upp sunnudagin, 17. juni, kl. 15. Hetta er ein fotoframsýning, ið nevnist "JAPANS RO", hjá dananum Palle Kjærulff Schmidt. Evnið, framsýningin lýsir, er sera ta gomlu japonsku mentanina og menniskjuna. Myndirnar eru í litum. Palle Kjærulff Schmidt, sum er meistarin aftan fyri framsýningina, er film- og teaturinstruktørur og hevur eisini arbeitt við TV-dramatikki og hoyrispølum. Hann er heiðurslimur av "Donskum Filminstruktørum" og hevur í seinastuni skriva fleiri bøkur, sum við myndum og teksti lýsa síðsøgu og lívhátt ymsastaðni í verðini. Palle Kjærulff Schmidt verður sjálvur við, tá ið framsýningin letur upp, og fer at siga eitt frá um fotomyndir sínar. Til ferniseringina verður eisini klarinettónleikur v/ Peter Riis og boðið verður kaffi og smákøkur. Framsýningin verður opin til og við 15. juli.


